Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Fundur við NATO-umboð, viðgerð av hernaðarradara og ábyrgd mótvegis Løgtinginum

Spurningar:

1. Hví hevur løgmaður ikki ráðført seg við Uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum, nú hann hevur havt fund við NATO-umboð, meðan mál um hernaðarradara hjá NATO í Føroyum er á skránni?

2. Hví segði løgmaður við fjølmiðlar, at hann fór ikki at viðgera spurningin um hernaðarradara í Føroyum beinleiðis við NATO-aðalskrivaran og onnur NATO-umboð, tá ið hann nú hevði allar møguleikar at gera tað?

3. Var spurningurin um hernaðarradara í Føroyum viðgjørdur á fundum løgmans við NATO-umboð, og um so er, hvat varð sagt og viðgjørt?

4. Hevur løgmaður givið NATO-umboðum ta fatan, at tað eru danskir myndugleikar, ið eiga endaligu avgerðirnar um hernaðarmál í Føroyum?

5. Nær hava Løgtingið og Føroya fólk samtykt, at aðrir myndugleikar, enn teir, ið vit sjálv hava valt í Føroyum, kunnu samráðast um og taka avgerðir um, hvat okkara land skal brúkast til í hernaðarmálum?

6. Kennir løgmaður ábyrgd mótvegis fólkavalda Løgtinginum í viðgerðini av hernaðarmálum, ella heldur hann seg verða lagdan undir danskt vald í hernaðarmálum?

Viðmerkingar:
Í fjømiðlunum fáa vit sum fólkavald løgtingsfólk í Føroyum at vita, at løgmaður hevur verið á fundi við NATO-aðalskrivaran og onnur umboð fyri NATO í Brússel.

Ongin ráðførsla ella kunning hevur verið í Uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum um hesar fundir løgmans, hóast eitt mál um hernaðarradara hjá NATO í Føroyum hevur verið til viðgerðar í Løgtinginum. Og hóast landsstýrismaðurin í uttanríkismálum hevur sagt alment, at ein avtala skal undirskrivast um hetta í næstum.

Á hesum fundum í Brússel hevði gylt høvi verið at viðgjørt ynskini og grundgevingarnar hjá NATO fyri einum hernaðarradara í Føroyum, beinleiðis millum Føroyar og NATO. Men hetta skuldi ikki gerast sambært útsagnum løgmans í fjølmiðlunum.

Til tess at fáa greiði á, hví løgmaður er farin soleiðis fram, og hvussu hann sær sína ábyrgd mótvegis fólkavalda Løgtinginum, verður fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 15. november 2021

Høgni Hoydal